Til Løgmansskrivstovuna **14-11-2025**

Hoyringarskriv til Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum frá P/F Suðuroyartunnilin

Alment:

P/F Suðuroyartunnilin hevur fingið til uppgávu at finna loysnir til, hvussu ein farleið gjøgnum ein suðuroyartunnil til Suðuroyar kann fáast til at lata seg gera. Hetta arbeiðið er gjørt innanfyri rammur við atliti at trygd, jarðfrøði og kostnaði. Afturat hesum koma so viðurskifti, sum umhvørvi, lokal áhugamál o.l., sum takast má fyrilit fyri, í tann mun tað letur seg gera, so ávirkanin verður so lítil, sum gjørligt.

Suðuroyartunnilsverkætlanin er ovurhonds stór, og tí mugu allir váðar avmarkast mest møguligt, og helst útilokast. P/F Suðuroyaroyartunnilin hevur drúgvar royndir við hesum, frá verkætlanini at byggja Eystur og Sandoyartunnilin, sum í vavi er um somu stødd. Tí verður mælt til, at royndirnar frá tí verkætlanini verða brúktar í mest møguligan mun, har m.a. áherðsla var løgd á at avmarka allar váðar mest møguligt. Úrslitið var eisini, at verkætlanin helt metta kostnaðin tá fíggingarleisturin var snikkaður til, og lániavtala var undirskrivað.

Serliga er tað undirsjóvartunnilsarbeiðið, sum hevur stóran váða, eftirsum arbeitt verður undir havyvirflatuni, og arbeitt verður gjøgnum tilfar, sum ongin endaliga kennir, fyrr enn komið er ígjøgnum, hóast jarðfrøðiligar forsagnir fyriliggja. Møgulig óhapp kunnu hava ovurhonds stórar avleiðingar, bæði fyri arbeiðsfólk, fyri samlaðu verkætlanina og fyri landið. Tí verður frámælt, at undirsjóvartunnilin verður longri enn hægst neyðugt. (Skriv frá Sintef)

Framleiðslan í byggitíðini kostar uml. 1-2 milliónir kr. um dagin, og tí má verkætlanin í útgangstøðinum vera so einføld og væl skipað, sum gjørligt, so trupulleikar ikki viðføra seinkingar og eykakostnaðir.

Ognartøka:

Í §7 í lógaruppskotinum, verður veitt felagnum heimild at ognartaka neyðugt lendi v.m. um semja ikki fast við tey ið eiga ognirnar.

Orðingin er tann sama sum í løgtinglógini um Eysturoyartunulin og Sandoyartunulin, men í viðmerkingunum stendur, at treytaðar avtalur kunna gerast. Hetta má ikki tulkast soleiðis, at tað bert er heimild at gera treytaðar avtalur, tí so kann hetta geva trupulleikar fyri tey, ið møguliga mugu fara úr húsum sínum, tí sølupeningurin evt. skal brúkast til at keypa eini onnur hús. Skotbráði frá tí at ein byggisáttmáli er undirskrivaður, eftir at heimild er fingin í løgtinginum, er ov stutt til tá at útinna eitt evt. keyp. Tí má felagið kunna keypa møguliga ognir, har annar møguleiki

ikki er. Vísir tað seg so, at verkætlanin ikki verður til nakað, kann handilin ganga aftur, ella at ognin verður seld í fríðari sølu.

Standardar og Normar

Í §4 stendur, at Landsverk skal undir ábyrgd mótvegis landstýrisfólkinum góðkenna verkætlanirnar. Í viðmerkingunum til lógina stendur, at Landsverk skal tryggja at teir normar og standardar, sum Landsverk brúkar og eru galdandi á økinum vera hildnir. Henda verkætlan er so serskild, at tað eigur at standa í viðmerkingunum, at tá trygd og annað loyvir tí, kann Landsverk geva frávik frá hesum normum og standardum. Hetta fyri at tryggja at verkætlanin kann gjøgnumførast sum ætlað.

Fyrireikandi verkætlanir

Fyri at avmarka váðarnar og stytta byggitíðina, har long byggitíð er ein váði í sær sjálvum, metir felagið at tað er skilagott eins og var gjørt í Eystur og Sandoyartunlinum, at arbeiðsvegir og inntøk verða gjørd frammanundan til undirsjóvartunnilin. Talan er um inntakið í Djúpadali og í Sandvík. Hetta kundi stytt byggitíðina við upp til ½ ár. Hesi arbeiðir kundu verið boðin út til føroyskar byggifyritøkur og hevði ein partur av peninginum liði eftir í føroyska samfelagnum. Hesi arbeiði kosta um 30 mió. at gera. Tað kundi verið álagt felagum at fylt inntøk og at taka arbeiðsvegir burtur aftur um verkætlanin ikki verður til veruleika.

Ferðslumyndigleikin

§ 6, stk. 5 í uppskotinum er soljóðandi:

Stk. 5. Í mun til loyvi sum krevjast frá ymsum myndugleikum o.a. gongur arbeiðið við Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum eftir somu reglum sum landsvegagerð.

Í viðmerkingunum til hesa lógargrein stendur:

Til § 6, stk. 5 Landsverk hevur gjøgnum árini upparbeitt ymiskar siðvenjur um, hvørji loyvi krevjast í sambandi við landsvegagerð. Við hesi áseting fær P/F Suðuroyartunnil júst somu heimildir, sum Landsverk hevur upparbeitt gjøgnum árini.

Reglan samanhildið við viðmerkingarnar er torfør at skilja. Tá sagt verður, at P/f Suðuroyartunnil fær júst somu heimildir sum Landsverk eigur at vera nágreina, hvør er myndugleikin á økinum.

Vit mæla í staðin til, at løgtingslógin um Suðuroyarunnil fylgir júst somu princippum, sum eru galdandi í § 10 í løgtingslóg nr. 30 frá 14. Apríl 2014 við seinni broytingum, og at § 6, stk. 5 tí verður tikið burtur úr uppskotinum.

Sambært viðmerkingunum undir pkt. 1.4 verður fleiri ferðir nevnt, at Landsverk er ferðslufakligur myndugleiki (m.a. síða 11 og 14 í uppskotinum). Hetta er ikki rætt, tí ferðslutekniski myndugleikin liggur hjá løgregluni.

Myndugleikar

Fyri at kunna fara undir eina so stóra verkætlan er av sera stórum týdningi, at P/f Suðuroyartunilin og arbeiðstakarar kenna allar treytir, sum eru galdandi í byggitíðini. Hetta merkir, at áðrenn byggingin kann fara í gongd skulu øll almenn loyvir vera komin uppá pláss, herundir allar góðkenningar frá Umhvørvisstovuni og friðingarmyndugleikum. Tað ber ikki til, at myndugleikar gjøgnum byggitíðina koma við nýggjum treytum sum ikki vóru kendar, tá byggingin fór í gongd. Í eini so stórari verkætlan ber ikki til at fortreytirnar fyri byggingini broytast munandi eftir at byggisáttmáli er gjørdur. Einhvør broyting av fortreytunum fyri sjálva byggingina fara tá at hava við sær eyka kostnað.

Vinarliga

P/F Suðuroyartunnilin